# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Almennu Føroyar mugu traðka í karrakter

Umleið 40 føroyskir fiskimenn hava sitið sum gíslar umborð á Skálabergi í russiskari havn í skjótt tríggjar vikur. Hesir lýða heilt avgjørt undir tí trýsti og fangilsi teir í veruleikanum eru í. Enn hava ikki verið tær stóru yvirskriftirnar um júst hetta, og tað kann undra. Hví hevur verið so lítið hugsað um rættindini og liviumstøðurnar hjá manningini! Er talan ikki um brot á vanlig mannarættindi. Um hetta var ein sak í Danmark ella øðrum landi, hevði hetta so ikki sett tað stóra skútsið ella diplomatiið í gongd, og høvdu ikki bæði politikarar og mannarættindafólk verið á barrikadunum!

Her hendir "einki". Tað má vera eitt ófrávíkiligt krav til bæði Fiskimálaráðið og Uttanríkismálaráðið og fyri tað alla politisku skipanina við løgmanni á odda at taka hetta upp sum eitt mannarættindamál.

Málið er komið hartil, at tað er ikki bara ein spurningur um kvotur og fiskiveiði ella manglandi embætisførslu. Vit vita framvegis ikki, hvat í veruleikanum er hent og hví russar bøla yvir málið. Her má handlast.

Tað er uppá tíðina, at løgmaður eisini traðkar í karrakter í málinum og gevur til kennar sína hugsan. Sjálvandi eiga vit ikki at leypa framav og sjálvandi eiga vit at brúka dialogin og diplomatiið, men har hetta ikki røkkur, har má annar lútur til. Hóast vit eru smá so eru vit kortini partur av alheiminum. Okkara politiska skipan má til at gera alvorliga vart við støðuna, sum er íkomin, har 40 føroyskir fiskimenn verða hildnir gíslar í Ruslandi.

Tað var einaferð, at Føroyar høvdu ein løgmann við gjøgnumslagskraft og pondus. Vit minnast, hvussu kontantur Atli Dam var, tá felagsskapir fóru undir at reka hetz og boykott av Føroyum vegna grindadráp. Tá langaði Atli Dam til og kallaði teir fyri búskaparligar terroristar.

Vit siga ikki, at Kei Leo Johannessen skal kalla russar fyri líkt ella ólíkt. Men hann hevur skyldu til sum Føroya løgmaður at tala at. At lata seg hoyra í umheiminum.

**Sosialurin**

## Eysturkommuna og 0-flokkur



**JÓGVAN PHILBROW**
Nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag

Hvat er tað, ið gongur fyri seg í Eysturkommunu? Ein arbeiðsbólkur, settur av kommununi, hevur uppskot um at seta ein 0-flokk á stovn. Hetta er partur av einari heildarætlan, ið umskipar teir báðar verandi skúlarnar í kommununi.

Fyrst skal nevnast at ætlanin serliga ber brá av, at við umskipanini av báðum skúlunum, har ið annar skúlin skal taka sær av teimum eldru børnunum og hin taka sær av yngru børnunum, gongur kabalin ikki upp. Trupult er at býta teir 7 flokkarnar í 2 og fáa líka nógvar flokkar í báðum skúlunum. Ikki ber til at fara eftir 8 flokk, tí tey børnini ganga í Fuglafjarðar skúla. Tí kemur ein onnur loysn á borði - 0-flokkur. Soleiðis ber til at tryggja, at báðir skúlarnir verða javnt býttir og kommunusamanleggingin er bjargað.

Tað stendur mær púra greitt, at hendan ætlanin á ongan hátt byggir á tankar um, hvat veruliga er best fyri barnið. Tað kemur serliga til sjóndar í hesum brotinum úr álitinum:

*»Verkætlanarbólkurin mælir til, at 0-flokkur verður settur á stovn í Eysturkommunu at byrja skúlaárið 2010/11. Tilmælið er grundað á royndirnar, ið aðrir skúlar hava gjørt á hesum økinum t.d. sankta Frans skúlin í Tórshavn og skúlabólkar runt um í landinum.*

*Mett verður at 0-flokkur megnar á fullgóðan hátt at tillaga næmingarundirvísingina, soleiðis at allir næmingar fáa eina lagaliga skúlabyrjan og samstundis verða skjótari skúlabúnir. Styrkta samstarvið millum námsfrøðing og lærara fyribyrgir eisini møguligum byrjunartrupulleikum«.*

Her sæst týðuliga, at eingin námsfrøðingur er hoyrdur ella hevur verið við í hesum arbeiði, hví? Kanska tí at ein námsfrøðingur hevði sett spurningin. Hvat er best fyri barnið?

0-flokkur í Eysturkommunu tykist bert byggja á ætlanir um at nøkta tørvin hjá lærarunum í báðum skúlunum í kommununi.

Føroya Pedagogfelag hevur ikki avvíst »tankan« um forskúlar, felagið hevur sagt seg sinnað at fara inn í dialogin um, hvat er best fyri tey 6 ára gomlu børnini.

Sum støðan nú er, eru longu skipaði viðurskifti á økinum - innan dagstovnar o.l. tí eigur ein framtíðarloysn ikki gera støðuna verri hjá teimum seks ára gomlu børnunum. Um hesin kommunali bólkurin hevur so ilt við at síggja, hvat hendir við teimum 6 ára gomlu á dagstovnunum, eru fleiri námsætlanir tøkar á alnótini.

Tað ber ikki til, at grundin fyri at stovnseta ein »0-flokk« skal vera tí ein kommuna ætlar sær at fáa eina kabal at ganga upp ímillum tveir skúlar.

Citat John F. Kennedy

## Ikki spyrja, hvat títt land kann gera fyri teg. Spyr teg sjálvan, hvat tú kann gera fyri land títt

**MARITA DEBESS MAGNUSSEN**

Hóskvøldið tann 3. desember sat eg og hugdi at Fólksins rødd í Kringvarpinum. Nakrir menn sótu í undirhúsinum og spældu kort, tá ið tann eini segði, at ungdómurin heldur skuldi sagt og hugsað, hvat tey kunnu gera fyri Føroyar enn altíð at tosa um at tey ikki vilja heimaftur, tí hetta og hatta er so keðiligt í Føroyum. Eg kundi ikki havt sagt tað betur sjálv. Vit kunnu ikki altíð hugsa, at landið skal gera bæði eitt og annað fyri okkum. Vit eiga eisini at hugsa, hvat vit kunnu gera fyri okkara praktfulla land.

At fara av landinum og nema sær útbúgving er ein partur av lívinum hjá nógvum føroyingum.

Tað er sera gott, at ungdómurin fer uttanlands at fáa sær útbúgving, og tað er samstundis sera gott fyri Føroyar og fólkið í Føroyum at fáa vælútbúgvin fólk við royndum heimaftur, tá kunnu vit í Føroyum verða við í altjóða høpi í so nógvum ymiskum samanhangum. Tí víst er tað, at vit hava sera nógv dugnalig fólk í Føroyum.

Men tað er eisini harmiligt at hoyra ungdómin siga, at tey ikki hava nakað at koma heim til. Tí tað er ikki satt. Vit eru nógv, ið eru komin heimaftur eftir lokna útbúgving, og vit hava skapt okkum eina góða tilveru á hvør sín hátt. Og so royna vit eftir førinum at fáa sum mest burturúr tí, sum vit hava lært. Um karmarnir ikki eru í Føroyum frammanundan, so kunnu vit kanska vera við til at skapa teir sjálvi.

Eg vil bara siga, at tað ber til at nema sær útbúgving í útlondum og koma heim aftur til Føroya við sínar familju. Tað er bert ein spurningur um at skapa nakað sjálvur ella vera við til at uppbyggja okkum sum land. Tá ið tú hevur fingið møguleikan til tað, er tað ongar avmarkingar fyri, hvat tú kanst verða við til at skapa.

Vælkomin heim aftur til Føroyar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.